# Helgir hevur verið trúgvur í Kolinum

*– Tað kann vera, at vit fáa ein líka góðan mann aftur. Men at vit fáa ein betri menn enn Helgir aftur í kolið, tað trúgvi eg onki uppá, siga starvsfelagin*

ÁKI BERTHOLDSEN

Hann var bara 14 ára gamalur, táið hann fyrstu ferð fór inn í tær slavnu og myrku kolaminurnar í Hvalba at arbeiða.

Tað var í 1949. Og nú, vit skriva 2000, er hann framvegis álitið í kolinum.

Sostatt hevur Helgir Thomsen nú verið kolamaður í Hvalba í yvir 50 ár.

Og fyri hesa trúgvu tænastuna, fekk hann leygardagin „Den kongelige belønningsmedalja" frá drotningini.

Tað var bygdaráðsformaðurin í Hvalba, Levi Niclasen, sum, vegna drotningina, handaði honum medaljuna á eini lítlari, men avbera hugnaligari samkomu heima hjá Helgiri sjálvum, har arbeiðsfelagir í kolinum, umboð fyri arbeiðsmannafelagið Roynd, og næstringar hittust at heiðra hann hesa hátíðarløtuna.



*Fimti ár er ein langur arbeiðsdagur í kolaminunum í Hvalba. Men so leingi hevur Helgir Thomsen verið í kolinum, og fyri trúgvu tænastu sína, fekk hann leygardagin medalju frá drotningi. Á veggium er klokka og barometur, sum hann fekk frá arbeiðsmannafelagnum*

Bygdaráðsformaðurin segði, at í 1949 vóru tíðirnar so, at tað var at sleppa sær úr skúlanum sum skótast, helst sama dag. sum ein fylti 14 ár. Men í Hvalba var lítið annað í at velja, uttan at fara í kolið, ella at fara til skips.

–Sjómenninir forvunnu kanska eitt sindur meiri enn kolamenninir. Men viðskeri er við øllum, tí sjómenn mistu nógv av sínum heimalívi.

Levi arbeiddi sjálvur saman við Helgir í kolinum eina tíð. Og hann helt, at øll kundu taka undir við sær í, at Helgir hevði verið ómetaliga trúgvur og álítandi.

### Altíð gingið á odda

Elmar Skaalum, sum er næstformaður í Arbeiðsmannafelagnum Roynd, og gamal starvsfelagið hjá Helgir, segði, at ongin kundi vera í iva um, at hann hevði hendan heiðurin fult uppibornan.

–Tað sigst, at maður kemur í mans stað. Og tað kann vera, at vit fáa ein líka góðan mann aftur í koli, sum Helgir hevur verið.

– Men at vit faá betri mann, tað trúgvi eg onki uppá.

Hann segði, at hann hevði altíð verið undangongumaður í kolinum.

– Tú hoyrdi hann aldrin ilskast, tá ið tað gekk illa í hond. Komu vit í banka, flenti hann bara og segði, at hetta kunnu vit onki gera við, vit mugu bara royna at koma víðari.

### Altíð trúð uppá kolið

Sjálvur sigur Helgir, at hann hevur altíð trúð uppá koladriftina.

Og honum hevur eisini altíð dámt væl í kolinum.

So hóast hann onkuntíð hevur verið burturfrá nakrar mánaðir í øðrum arbeið, hevur ann altíð malið aftur á kolið.

Men nú er kolagrevsturin í Hvalba bara ein viðfángingur av tí, sum tað onkuntíð hevur verið.

Tað einu tíðina høgdu teir 15.000 tons av koli um árið í Hvalba og tá vóru vit einir 250 mans til arbeiðs í minunum.

– Tá arbeiddu vit í átta minum og tað vóru um 20 mans í hvørjari minu, fleiri í summum og færri í øðrum.

Nú eru teir ikki fleiri enn fýra mans eftir í kolinum og teir høgga ikki meiri enn eini 200-250 tons um árið.

Helgir Thomsen sigur, at hann heldur, at tað hevur gott at arbeiða í kolinum, tó at tað er ómetaliga strævið viðhvørt.

Men eitt tað ringasta er, at viðhvørt er luftin so ring, at mann maktast burtur beinanvegin. Tá verður tað eisini ómetaliga kvali í minunum, sigur Helgir Thomsen.

– Men sjálvsagt eru eisini góðar og hugnaligar løtur í kolnium.

Og eitt, sum honum hevur dámt, er, at tað hevur eitt ógvuliga frítt arbeiðspláss, tí tað hevur altíð borið til farið frá viðhvørt.

# Løgmaður hótti Helenu til at siga leiðaran upp

*– Veruliga orsøkin til, at Jákup Mørkøre varð sagdur upp, var, at løgmaður sendi Helenu Dam á Neystabø hóttanarskriv, har hann beinleiðis kroystir hana til at gera bart, sigur sakførarin hjá tí koyrda leiðaranum*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Jákup Mørkøre var ikki sagdur upp sum leiðari á Landssjúkrahúsinum tí hann var óloyalur ella ikki megnaði at stýra Landssjúkrahúsinum nøktandi.

Tað heldur sakførarin hjá Jákupi Mørkøre og fakfelagið hansara, Verkfrøðingafelagnum.

Í einum brævi til Helenu Dam á Neystabø um uppsagnina, sigur sakførarin hjá Jákupi Mørkøre tvørturímóti, at tað er grund til at halda, at veruliga orsøkin til uppsøgnina var eitt bræv, sum løgmaður sendi Helenu Dam á Neystabø um viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum.

Í brævinum sigur, løgmaður, at fjølmiðlarnir hava kunnað hann um ætlaðar hópuppsagnir á Landssjúkrahúsinum.

Løgmaður sigur, at talan er um eitt stórt og álvarsligt mál.

Hann sigur eisini, at hann kann als ikki góðtaka, at tílík stórmál verða borin fram, uttan at hann er kunnaður og, uttan at málið er viðgjørt á landsstýrisfundi.

– Er orsøkin til hetta vánaliga arbeiðslag tann, at embætisførslan í fyrisiting tygara ikki hevur verið nøktandi, eigur hetta at fáa avleiðingar. Um so er, at greiða ikki fæst á hesum alt fyri eitt, fer løgmaður sjálvur at taka neyðug stig í hesum máli, sigur løgmaður í brævinum til Helenu Dam á Neystabø.

Brævið frá løgmanni er ikki dagfest.

### Helena visti alt

Sakførarin hjá Jákupi Mørkøre sigur, at eftir hesum at døma, er grund til at halda, at veruliga orsøkin til, at Jákup Mørkøre skuldi sigast úr starvi, var, at løgmaður ikki var kunnaður um, ella tí at ætlaðu uppsagnirnar ikki høvdu verið viðgjørdar á landsstýrisfundi.

Jákup Mørkøre og sakførari hansara halda somuleiðis fast um, at tað er púra vist, at allar sparingarnar vórðu gjørdar eftir beinleiðis boðum úr almanna og heilsumálastýrinum og at stýrið var kunnað um tiltøkini í øllum smálutum, áðrenn tey vórðu sett í verk.

Ein týðandi grund hjá Helenu Dam á Neystabø fyri at siga Jákup Mørkøre upp, var, at

### Fylgja ikki egnum uppsagnarpolitikki

Sakførarin hjá Jákupi Mørkøre ger eisini vart við, at í hesum málinum hevur landstýrið ikki fylgt sínum egna, alment orðaða uppsagnarpolitikki.

Tí eftir honum, skal fyrst ein samrøða verða við tað fólkið, sum skal sigast upp.

Og hendan samrøðan skal vera væl fyrireikað, og tann, sum ber boðini, skal geva slr stundir til at tosa við viðkomandi.

– Hinvegin er veruleikin tann, at Jákup Mørkøre er enn ikki fullgreiður yvir kjarnuna í grundgevingum og í ávísum førum veit hann slett ikki, hvat meint verður við.

### Umhugsa at stevna

Tí mótmælir hann uppsøgnini. Og samstundis, ger hann eisini greitt, at verður uppsøgnin ikki tikið aftur, verður fyrivarni tikið fyri at royna málið í rættinum.

Keldur, sum standa málinum nær, men sum vilja vera ónevndar, halda eisini, at tað er ikki frítt, at løgmaður mótsigur sær sjálvum í hesum máli.

Tí, nú Jákup Mørkøre heitti á hann um at taka málið upp, hevur hann sagt, at tað er óvist, hvønn leiklut, løgmaður hevur í málinum og at tað verður kannað.

Samstundis hevur hann sagt, at løgfrøðingar eru komnir eftir, at eftirlitið, sum løgmaður hevur við landsstýrismonnum, er tað lógfrøðiliga eftirlitið.

– Men hví sendi hann so herfyri Helenu Dam á Neystabø hóttanarskriv, tá ið hann nú sigur, at tað er óvist, hvønn leiklut, hann hevur í málinum, tí her var ikki talan um eitt lógfrøðiligt mál? spyrja keldur, sum standa málinum nær.

Sjálvur hevur løgmaður ongar iðmerkingar, tí hann sigur, at enn er málið ikki búgvið til tess.



*Anfinn Kallsberg*
*løgmaður*

Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður
Almanna- og Heilsumálastýrið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Løgmaður er gjøgnum fjølmiðlarnar vorðin kunnaður um ætlaðar hópuppsagnir á Landssjúkrahúsinum. Talan er um eitt stórt og álvarsligt mál, sum løgmaður av tygum ikki er vorðin kunnaður um.

At tílík stórmál verða borin fram í fjølmiðlunum, uttan at løgmaður er vorðin kunnaður, og uttan at málið er viðgjørt á landsstýrisfundi, er ikki nøktandi. Løgmaður kann als ikki góðtaka hesa framferð.

Er orsøkin til hetta vánaliga arbeiðslag tann, at embætisførslan í fyrisiting tygara ikki hevur verið nøktandi, eigur hetta at fáa avleiðingar. Um so er, at greiða ikki fæst hesum alt fyri eitt, fer løgmaður sjálvur at taka neyðug stig í hesum málið.

Sagt verður frá hesum.

Vinarliga

Anfinn Kallsberg
løgmaður

*Hetta er eitt stutt bræv við stórari ávirkan. Jákup Mørkøre og sakførari hansara halda, at tað er hetta stutta brævið frá løgmanni til Helenu Dam á Neystabø, sum var veruliga orsøkin til, at leiðarin á Landssjúkrahúsinum varð sagdur upp, tí tónin er greiður*



# Mælir til at skifta leiðslu Sambandsfloksins út

*Atli Hansen, fyrrverandi tingmaður Sambandsfloksins, heldur leiðsluna í flokkinum vera so stirvna, at hon er ein stórur meinbogi fyri at finna loysn á ríkisrættarliga spurninginum*





*Vátt er komið í Sambandsreiðrið. Atli Hansen, fyrrverandi tingmaður floksins mælir til at koyra Edmund Joensen frá*

JOHN JOHANNESSEN

– Higartil hevur leiðslan í Sambandsflokkinum verið ein gáva til fullveldisætlanina. Hetta eigur at verða broytt, og eiga vit at velja eina aðra leiðslu á komandi landsfundi hjá Sambandsflokkinum, sum er síðst í mars mánað.

Hesi orðini eigur Atli Hansen, fyrrverandi umboð Sambandsfloksins á tingi. Hann mælir í bersøgnari viðmerking í blaðnum í dag til at skifta leiðslu Sambandsfloksins út sum skjótast, so flokkurin í staðin fyri at halda seg burtur frá fullveldisætlanini sleppur at hava ávirkan á hana.

### Vegleiða Javnaðarflokkin ov nógv

Atli Hansen heldur, at leiðsla Sambandsfloksins nýtir alt ov nógva orku til at siga Javnaðarflokkinum, hvat er rætt og hvat er skeivt í málinum um ríkisrættarligu støðuna.

– Skrivingin hjá sambandsleiðarunum gongur mest út uppá at fortelja javnaðarmonnum, hvat ið teir áttu at gjørt ella skulu gera. Ógvuliga lítið — fyri ikki at siga einki — um, hvat Sambandsflokkurin hevur at lata fyri at loysa hesar trupulleikar, sum hann sjálvur hevur verið við til at leggja støðið undir, sigur Atli Hansen.

Fyrrverandi tingmaðurin hjá Sambandsflokkinum heldur, at Sambandsflokkurin heldur átti at roynt at drigið somu línu sum Javnaðarflokkurin í spurninginum um ríkisrættarligu støðuna. Atli Hansen vísir í hesum sambandi á, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava tað til felags, at teir báðir eru ríkisfelagsskapsflokkar.

– Flokkarnir eru samdir um, hvar markið gongur. Eisini eru teir langt á vegnum samdir í búskaparligum, sosialum, vinnuligum og mentunarligum málum, og skulu tí heldur ikki hava trupulleikar í at arbeiða saman í hesum málum.

### Skulu nýta orkuna ørvísi

Atli Hansen sigur seg taka fult undir við uppskotinum »Nýggjar Tíðir«, sum er uppskot Sambandsfloksins til endurnýggjan av sáttmálanum Danmarkar og Føroyar ímillum.

Orsøkina til, at lítil og eingin undirtøka annars finst fyri hesum uppskoti millum fólk heldur hann vera einfalda. Sambandsflokkurin nýtir, eftir hansara tykki, nevniliga alla orku til at siga Javnaðarflokkinum, hvat er rætt og hvat er skeivt, í staðin fyri at nýta alla orku til áhaldandi at greiða fólki frá innihaldinum í Sambandsuppskotinum og hvat Sambandsflokkurin vil.

### Fekk forboð frá leiðsluni

Atli Hansen sigur, at hann sjávur hevur roynt at sett dagsskránna í spurninginum um ríkisrættarligu støðuna. Hetta var, tá hann var tingmaður í 1995. Men hetta eydnaðist honum ikki, tí hann fekk forboð fyri hesum frá leiðsluni.

– Sjálvt um vit helst vóru ein meiriluti í tingbólkinum, sum hevði hug at fara undir at viðgera hesi mál, so varð tað bannað av leiðsluni at taka nógv av hesum, sum nú verður skotið upp, upp á tunguna, greiðir Atli Hansen frá í politisku viðmerking síni.

Eisini sigur Atli Hansen, at Sambandsflokkurin tá hevði møguleika at taka undir við einum javnaðaruppskoti um at seta niður eina nevnd til at kanna møguleikarnar fyri at seta eina nevnd at kanna tey ríkisrættarligu viðurskiftini - eina sokallaða stjórnmálanevnd.

Men hesum vildi leiðslan í Sambandsflokkinum ikki ganga við til.

– Hevði Sambandsflokkurin tikið undir við hesum uppskoti, so høvdu tennirnar verið trektar úr øllum fullveldistosi í nógv ártíggju framyvir, tí so hevði spurningurin verið viðgjørdur í ríkisfelagsskapshøpi og ikki í sum ein spurningur um fullveldi ella ikki.

### Møguleiki fyri breiðari semju

Verður leiðslan í Sambandsflokkinum skift út, sær Atli Hansen møguleika fyri breiðari semju um ríkisrættarliga spurningin. Hann heldur, at Sambandsflokkurin saman við Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum eigur at arbeiða fyri at finna eina semju. Hendan semjan, heldur hann, hevði verið tann besta og tann longst varandi.


